B68– FS Vágar 3–2 (2–1):

# Vágamenn aftur sørir av Skálafjørðinum

**Frísparksmálið hjá Øssuri Hansen minti nógv um tað, sum hann á sinni skoraði ímóti Slovenia**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Jóannes Hansen*

Eftir hálvkiksaran á Sevmýri næstsíðsta leygardag kom B68 aftur á beint leygardagin. FS Vágar var á Svangaskarði, og vágamenn noyddust aftur hesa ferð ígjøgnum undirsjóvartunnulin við ongum stigi, eftir at teir enn eina ferð høvdu skorað tvey mál.

Líkindini darvaðu fótbóltsspælinum. Viðhvørt stóðu grovir útnyrðingskavaælingar inn á Svangaskarð, og inn ímillum var fínasta veður.

Poleraðum fótbóltsspæli var millum lítið og einki at síggja av. Liðini stríddust um hvønn bólt, og tað var eingin ivi um, at heimaliðið var omaná. FS Vágar skal hava rós fyri, at teir hesa ferð – mótsatt tá ið teir næstsíðsta leygardag vóru í Runavík – ikki fóru niður við nakkanum í 2. hálvleiki. Teir minkaðu um munin til 3–2, tá ið tað restaðu tjúgu minuttir, men teir vóru kortini ikki nøkur álvarslig hóttan ímóti heimasigrinum. Seinna FSV málið skoraði vandamikli brasiliumaðurin Clayton Soares. Eftir uppspæl í vinstru gjørdist hann leysur. B68 málverjin tóktist ætla sær út ímóti, men broytti so ætlan, og tá ið hann fór eftir hæli aftur, lyfti brasiliumaðurin hegnisliga í málið.

Fróði Benjaminsen setti hol á miðskeiðis í 1. hálvleiki. Hann var leysur í brotsteiginum í høgru, og skotið úr spískum sat í handara síðunetinum aftanfyri nýggja FSV málverjan, Jákup Joensen.

Miðverjin Dánial Hansen økti til 2–0. Hann var fyrstur á hornasparksinnleggi úr vinstru og stýrdi við høvdinum bóltinum í málið. Undan steðginum minkaði Jens Erik Rasmussen um munin. Hann smekkaði til, Albert Sævarson í B68 málinum tóktist hava tak á støðuni, men háli bólturin smoygdi sær frá honum og rullaði inn um strikuna.

Tá ið ein tími var farin skoraði Øssur Hansen eitt fínt mál upp á fríspark. Tað minti heilt nógv um, tá ið Øssur við beinleiðis frísparki í síðstu løtu ímóti Slovenia sendi bóltin upp um manngarðin og dygst inn undir tvørtræið.

Komandi leygardag skulu NSÍ og B68 spæla toppdyst í bólkinum, meðan FSV fær fyrsta møguleikan á heimavølli, tá ið TB fyri fyrstu ferð skal spæla á útivølli.

**B68– FS Vágar 3–2 (2–1)**
1–0: Fróði Benjaminsen 25.
2–0: Dánial Hansen 36.
2–1: Jens Erik Rasmussen 43.
3–1: Øssur Hansen 60.
3–2: Clayton Soares 71
Dómari: Jens Petur Brattalíð

B68: Albert Sævarson – Mannbjørn Nesá, Hans Fróði Hansen, Dánial Hansen, Bogi Petersen – Jóhan Petur Poulsen, Jan Ingi Petersen, Fróði Benjaminsen, Øssur Hansen – Súni Fríði Johannesen, Kristian Anton Andreassen
FS Vágum: Jákup Joensen – Sjúrður Ellefsen, Jóhannis Joensen, Albert Ari Thomassen, Silva Braga – Birgir Joensen, Ruslan Screlea, Jens Erik Rasmussen, Vlad Osipov – Clayton Soares, Eyðfinn Fjalsbak



*Tað stóð nógv á hjá KÍ, men við einum máli frá Hjalgrím Elttør tryggjaðu teir sær annað stigið í trupla útidystinum leygardagin*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

VB-KÍ 1-1 (0-0):

# Samdust í storminum

**VB og KÍ fingu eitt stig hvør, tá tey í ódnarveðrið leiktu javn á Eiðinum í Vági**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Jákup Mørk*

Klaksvíkingar vóru kroystir, tá teir komu til Vágs at spæla dyst. Greiða tapið fyri EB/Streymi í fyrsta teljkandi dystinum á árinum hevði viðført, at stig nú skuldu fáast til vega, og hetta er vanliga ikki nøkur løtt uppgáva á Eiðinum.

Vána veðurlíkindini mundu ikki gera støðuna betri í so máta, tí tað tóktist longu greitt undan dystinum, har her kundi tað vær verða, at tilvildin fór at gerast avgerandi.

Fyrra hálvleik var tað KÍ, sum hevði vindin undan, og serliga fyrstu løtuna nýttu teir hetta til at leggja eitt stórt trýst á VB-málið. Liðið var nakað umskipað í mun til seinast. Alexander Djordjevic var aftur í miðverjuni, Harley Bertholdsen byrjaði inni, og hartil hevði Jan Joensen eisini gjørt av, at hann hesa ferð skuldi vera leikandi venjari, og teir vóru allir tríggir væl viðvirkandi til at halda trýstinum á VB.

Hjá vertunum bar snøgt sagt einki til hendan fyrsta hálva tíma ella har á leið. Samanhangandi sendingar vóru sum lundi á jólanátt, og mesta orkan varð nýtt til at sparka bóltarnar upp ímóti hvirlunum.

Tað eydnaðist tó ikki klaksvíkingum at fáa nakra úrtøku úr trýstinum. Hópurin av hornaspørkum og fleiri støður við trunkaspælið í brotsteiginum førdu ikki stórvegis við sær, og spakuliga kom VB alt betri við í dystin.

Vindurin makaði eisini nakað, heglingurin varð loystur av av einstøkum sólstrálum, og so við og við fór dysturin alt meira at líkjast vanligum fótbólti. Serliga hóvaði hetta vágbingunum, sum nú brádliga fingu nakað av ferð á. Við at halda bóltinum at jørðini fingu teir fleiri ferðir leikt seg niðan móti KÍ málinum, men teir heilt stóru møguleikarnir gjørdist talan tó ikki um.

### Lívligt seinna umfar

Møguleikarnir komu tó í seinna umfarinum. Vindurin var nú ikki eins nógvur, og KÍ var heilt hampuliga væl við fyrstu løtuna eftir steðgin, men tað gjørdist VB, sum skoraði fyrst.

Ein væl spældur diagonal bóltur til Palla Augustinussen tagaði KÍ verjuna sundur. Fyrstu royndina bjargaði Karsten Joensen tó sera væl, men bólturin støkk beint útaftur til Predrag Zivkovic, sum ikki hevði stórvegis trupulleikar at at beina bóltin í málið.

Og nú var tað VB, sum átti tørn. Fyrstu løtuna eftir málið skolaðu álopini oman móti KÍ málinum, og var tað ikki fyri KÍ-málverjan, er einki at ivast í, at talan hevði verið um fleiri mál, men hesi komu so ikki.

Og so hendi tað, sum tað so ofta ger í slíkum førum. Vágbingar tóktust vera nøgdir um tepru leiðsluna, og spakuliga tóku teir so longur aftur á vøllin. Klaksvíkingar fingu framvegis ikki teir nógvu møguleikarnar, men teir royndu at liggja framvið, og eina tíggju minuttir fyri leiklok fingu teir so løn fyri stríðið.

Ein bóltur var leiktur inn um høgra verjuborð hjá fløtu VB-verjuni. Harley Bertholdsen stríddu seg framat baklinjuni, og tá hann sendi út til Hjalgrím, var hesin ísakaldur.

Seinastu løtuna royndu báðir partar at seta seinastu kreftirnar inn í royndunum at fáa avgerandi málið. Fortreytirnar vóru kanska betri hjá vágbingum, eftir at Símun Joensen hjá KÍ varð rikin av vølli eftir at hava verið í hornatøkum við VB-leikara. Men hvørki teir stóru møguleikarnir og tíansheldur nakað mál komu afturat í dystinum, sum soleiðis endaði við javnleiki.

Og tað kunnu báðir partar sum so vera hampuliga væl nøgdir um. Trýstið undan dystinum var kanska størst á KÍ, sum hevði tapt í fyrsta umfarinum, og við einum stigi í Vági standa teir so ikki púrasta berir.

Tað gera vágbingar heldur ikki. Við fýra stigum á talvuni, hava teir í øllum førum eitt gott útgangsstøði at vinna seg víðari úr bólkinum. Hevði úrtøkan verið full, hevði tann spurningurin verið mest sum greiddur, men enn mugu vágbingarnir í øllum førum bíða nakað afturat.

### Dysturin í tølum

**VB-KÍ 1-1 (0-0)**
1-0: Predrag Zivkovic
1-1: Hjalgrím Elttør
Dómari: Niklas á Líðarenda



# Ongland sama sigur sum Føroyar

**Litava megnaði javnleikin í Týsklandi, sum Hjalgrím Elttør var um reppið at fáa føroyingum í oktober í fjør**

EM UNDANKAPPING
*Jóannes Hansen*

Eitt av mest umrøddu úrslitunum í umfarinum, sum leygardagin var í EM undankappingini, var tað í Týsklandi. Fyri einum lítlum hálvum ári síðani var um reppið, at týskarar upplivdu tað, sum teir ongantíð hava roknað við at kunna gerast til meiri enn marrukendan dreym og ikki til veruleika. Ta ferðina sendi Hjalgrím Elttør í síðstu løtu í stólparótina aftanfyri Oliver Kahn. Harvið vann Týskland 2–1 og øll stigini ímóti Føroyum.

Leygardagin høvdu týsku favorittarnir vitjan av Litava. Enn eina ferð varð alt annað enn heimasigur roknað sum sensatión. Og so vildi tað ikki øðrvísi til, enn at Litava, sum í oktober vann 2–0 á heimavølli ímóti Føroyum, megnaði 1–1. Í 8. minutti legði Ramelov heimaliðið framum, og so tóktist spurningurin bara vera, hvussu stórur sigurin hjá favorittunum fór at verða. Men týskarar fingu ikki fleiri mál, og teir komu seg ikki yvir skelkin, tá ið Rasanauskas, sum umsetti úr ellivu metrum til 1–0 ímóti Føroyum, skoraði til 1–1. Týskland vann 7. september í fjør 2–0 í Litava. Týska pressan heldur lítið um avrikið hjá Rudi Völler og hansara monnum leygardagin, og tað verður stórt trýst á týska liðnum, tá ið tað fyrst í juni fer at spæla í Føroyum.

Í hinum dystinum í bólki fimm ella okkara bólki hevði Skotland heimavøll ímóti Íslandi. Skotar vunnu 12. oktober í fjør 2–0 í Reykjavík, og aftur hesa ferð fekk Skotland øll stigini ímóti Íslandi. Skotarnir vóru uppsettir, og tað mundi kennast serliga søtur biti hjá Berti Vogts, tá ið hann frætti, at landsmenninir hjá honum, týskararnir, bara høvdu megnað 1–1 ímóti Litava.

Íslendingar hava higartil bara fingið stig í 3–0 sigrinum á heimavølli ímóti Litava. Luturin hjá Íslandi tykist tískil skula vera at stríðast við føroyingar fyri at sleppa undan aftasta plássinum. Skotland legði seg á odda í 11. minutti. Guðjónsson úr Chelsea javnaði við lobbara upp um málverjan, tá ið seinna umfarið var fýra minuttir gamalt, men tjúgu minuttir undan leikloki tryggjaðu skotar sær øll stigini.

Í morgin skulu skotar spæla í Litava. Úrslitið í tí dystinum fer at hava stóran týdning fyri, hvat av hesum báðum londunum skal stríðast við Týskland um fremsta plássið.

### Allan var treiskur

Umframt Ísland spældu bara tvey Norðurlond leygardagin. Danir vóru – og tað høvdu teir alla orsøk til – sera fegnir um 5–2 stórsigurin á Rumenia í Bukarest. Allan Simonsen og Luksemborg høvdu møguleikan at hjálpa Danmark. Tað megnaðu teir ikki, men teir vóru treiskir í Bosnia. Seinna umfarið var tólv minuttir gamalt, tá ið Bosnia fekk hol á, og trettan minuttir undan leikloki øktu teir til 2–0. Í báðum førunum var talan um verjustøður hjá Luksemborg, sum Allan Simonsen, tá ið hann var venjari í Føroyum, aftur og aftur segði ikki máttu koma fyri í dystum á hægsta støði.

Í morgin fáa Luksemborg og Allan Simonsen nýggjan møguleika at hjálpa Danmark. Tá fáa teir vitjan av Noregi, sum hevði frí leygardagin. Danmark skal í Parkini spæla ímóti Bosnia. Undan leygardegnum segði danski venjarin, Morten Olsen, at teir miðjaðu eftir seks stigum í hesum báðum dystunum, men at teir fóru at verða nøgdir, um teir fingu fýra. Nú verða danir vónbrotnir um teir ikki fáa øll seks stigini.

### Stór uppliving í Vaduz

Eingin ivi er í, at landsliðsspælararnir hjá Liktinstein leygardagin vóru partur av størstu royndini, sum teir nakrantíð fara at fáa á heimavøllinum í Vaduz. Liktinstein hevði vitjan av Onglandi, og úrslitið var ikki verri enn ilt hjá Liktinstein. Ongland megnaði á ongan hátt at niðurspæla heimaliðið. Onglandi vann 2–0. Michel Owen stútaði til 1–0 í 28. minutti, og David Beckham sendi fríspark beinleiðis í netið í 53. minutti. Eingilski liðformaðurin tóktist hjartans fegin og lættur um, at munurin øktist til 2–0, og at møguleikin fyri einum at kendu eingilsku kiksarunum harvið so at siga var burtur.

Føroyingar hava tríggjar ferðir spælt landsdyst ímóti Liktinstein, og føroyingar hava vunnið hvørja ferð. Í 2000 var úrtslitið 1–0 á vøllinum, sum Ongland leygardagin vann 2–0 á, og í fjør var úrslitið á Kypros 1–0 og í Gundadali 3–1.

### Malta stórtap

Tvær av tjóðunum, sum Føroyar áður hava sammett seg við í landsliðsfótbólti, hittust á Kypros, harÍsrael megnaði 1–1 ímóti heimaliðnum.

Føroyar hava tvær ferðir vunnið 2–1 ímóti Malta. Leygardagin var mótstøðan hjá Malta ógvuslig í Fraklandi, har heimaliðið vann 6–0. Malta helt tørn inntil í 37. minutti, men so gekk skjótt. Í fyrsta minutti hevði Malta møguleika, sum bar við sær, at franski Manchester United málverjin, Baltez, sá gula kortið. Zidane og Henry skoraðu tvær ferðir í part fyri Frakland, og Wiltord og Trezeguet fingu eitt í part. Tað var ikki eiti á spælarum, sum Malta stríddist ímóti.

Tað, sum Malta ikki megnaði, tað megnaði ein onnur av europeisku pinkutjóðunum. Kanska verður Albania ikki roknað millum tey allar minstu longur, men tað kom kortini sera óvart á, tá ið Albania leygardagin á heimavølli vann 3–1 á Russlandi.

Finnland tapti 2–0 í Italia, og Wales vann 4–0 á heimavølli ímóti Aserbadjan. Ryan Giggs skoraði fjórða málið, og nú eru vánirnar ikki so vánaligar fyri, at Manchester United stjørnan endiliga fer at sleppa upp í part í einum EM endaspæli. Giggs og Wales hava annars ongantíð luttikið í EM og HM endaspølum.


*Týskarar máttu lata sær lynda ein 1-1 javnleik, tá teir á heimavølli leiktu móti Litava*

# Úrslit úr EM-undankappingini

**Armenia-Norðurírland 1-0 (0-0)**
1-0: Petrosian, 86

**Georgia-Írland 1-2 (0-1)**
0-1: Duff, 18
1-1: Kobiascwili, 61
1-2: Doherty, 84

**Skotland-Ísland 2-1 (1-0)**
1-0: Miller, 12
1-1: Gudjohnsen, 48
2-1: Wilkie, 70

**Wales-Aserbadjan 4-0 (3-0)**
1-0: Bellamy, 1
2-0: Speed, 40
3-0: Hartson, 44
4-0: Giggs, 52

**Rumenia-Danmark 2-5 (1-1)**
1-0: Mutu,, 5
1-1: Rommedahl, 9
2-1: Munteanu, 47
2-2: Gravesen, 53
2-3: Tomasson, 71
2-4: sjálvmál, 73
2-5: Rommedahl, 90

**Hvítarussland-Moldova 2-1 (1-1)**
0-1: Cebotari, 14
1-1: Kutuzov, 42
2-1: Guerenko, 58

**Albania-Ruyssland 3-1 (1-0)**
1-0: Rraklli, 30
1-1: Karyaka, 76
2-1: Lala, 79
3-1: Tare, 83

**Cyern-Ísrael 1-1 (0-1)**
0-1: Afek, 1
1-1: Rauffmann, 61

**Kroatia-Belgia 4-0 (1-0)**
1-0: Srna, 9
2-0: Prso, 53
3-0: Maric, 68
4-0: Leko, 76

**Liktenstein-Ongland 0-2 (0-1)**
0-1: Owen, 28
0-2: Beckham, 53

**Týskland-Litava 1-1 (1-0)**
1-0: Ramelow, 8
1-1: Razanauskas, 73

**Makedonia-Slovakia 0-2 (0-1)**
0-1: Petras, 28
0-2: Reiter, 90

**Ukraina-Spania 2-2 (1-0)**
1-0: Voronin, 12
1-1: Raul, 84
1-2: Etxeberria, 87
2-2: Gorshkov, 90

**Póland-Ungarn 0-0**

**Bosnia Herseg.-Luksemb. 2-0 (0-0)**
1-0: Bolic, 53
2-0: Barbarez, 75

**Holland-Kekkia 1-1 (1-0)**
1-0: Nistelrooy, 44
1-1: Koller, 68

**Italia-Finnland 2-0 (2-0)**
1-0: Vieri, 6
2-0: Vieri, 22

**Frakland-Malta 6-0 (2-0)**
1-0: Wiltord, 37
2-0: Henry, 39
3-0: Henry, 54
4-0: Zidane (br.), 57
5-0: Trezeguet, 70
6-0: Zidane, 80